## Fiskaboykott ov seint



Herfyri heitti heimsnáttúrugrunnurin World Wildlife Foundation á fólk í Danmark um ikki at keypa tosk ella toskaflak í fiskahandlunum ella stórhandlunum, tí talan er um fisk úr stovnum, sum eru hóttir. Ístaðin fyri eiga fólk at keypa upsa ella aldan fisk, segði WWF. Men boykottið kemur eini seks ella átta ár ov seint, sigur formaðurin í danska fiskimannafelagnum, Flemming Kristensen, tí í dag verður torført at verja stovnarnar, sigur hann.

## Írskur trubadurur á Cafe Natúr

Hetta vikuskiftði fær Cafe Natúr vitjan av írska trubadurinum Kenny Delaney. Kenny er føddur og vaksin upp í Dublin. Hann hevur ferðast kring Evropa og virkað sum gøtutónleikari. Men nú hevur hann pakkað gittaran, munnharpuna og trummuna og kemur til Føroyar at undirhalda á Cafe Natúr.Á skránni verður festligur tónleikur. Poppur og rokkur frá teimum seinastu 40 árunum kryddaður við góðum írskum fólkatónleiki.

# Trygd 75 ár á baki




*Niels Juel Arge, virkandi stjóri á P/F Trygd*

**Í gjár hátíðarhelt tryggingarfelagið Trygd sín 75 ára stovningardag**

HÁTÍÐARHALD

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Norðurlandahúsið var karmur um stóran føðingardag. 4. august vórðu 75 ár liðin síðani tryggingarfelagið Trygd varð sett á stovn.

Tað var Thorstein Petersen, sum tók stig til at stovna P/F Trygd, og gjørdist hann eisini fyrsti stjóri felagsins. Christian Holm Jacobsen bleiv nevndarformaður, og júst hesir báðir vóru menninir aftanfyri stovnanina av Sjóvinnubankanum 6. oktober sama árið.

Bæði Janus Petersen, nevndarformaður í Trygd, og Niels Juel Arge, virkandi stjóri, nomu við søguna hjá felagnum í røðum sínum í sambandi við hátíðarhaldið. Greitt er eisini gjølla frá hesum í bókini hjá Jørn Astrup Hansen og Joan Paula Joensen, Bankarnir í 100 ár.

Tá kríggið tók seg upp, varð nýtt tryggingarfelag sett á stovn sambært »Midlertidig Bestemmelse for Færøerne om Forsikringsvirksomhed«. Hetta var Tryggingarsambandið Føroyar. Endamálið var »at samle mest muligt af Forsikringsvirksomheden på Færøerne, så længe de nuværende af Krigsforholdene følgende unormale Tilstande varer«.

Trygd vildi ikki gerast partur av Tryggingarsambandinum og tað førdi við sær, at tá Tryggingarsambandið 1. januar 1943 fekk einkarrætt at tekna tryggingar, bleiv virksemið hjá Trygd avmarkað til at endurnýggja gamlar tryggingar.

### Øktan marknaðarpart

Men í 1997 kom so nýggj tryggingarlóg sum førdi við sær, at einkarrætturin varð avtikin, og Trygd kundi aftur virka á sama føti sum kappingarneytin, sum nú eitur Tryggingarfelagið Føroyar.

Tað var Føroya Banki, sum endurstovnaði felagið, og øll tey fyrstu árini gav felagið hall. 2004 var fyrsta árið, at raksturin gav yvirskot, og hetta er vaksið ár undan ári. Í røðu síni upplýsti Janus Petersen, nevndarformaður, at Trygd í 2004 hevði ein marknaðarpart upp á 17%, meðan hesin í dag er komin upp á 23%

- Fólk vita nú, at Trygd er til, og at Trygd er komið fyri at verða. Við tí dugnaliga starvsfólkaskara, sum Trygd hevur, ivist eg ikki í, at Trygd verður eitt uppaftur sterkari felag komandi árini, eisini í kapping við útlendsk tryggingarfeløg, tá tann tíðin kemur, tí vit kenna marknaðin, vit vita, hvat vit vilja, og vit hava viljan til at menna okkum, segði Janus Petersen.

Samstundis sum felagið fyllir 75 ár eru tíggju ár liðin, síðani endurstovnanina.



*Jákup Veihe undirhelt til hátíðarhaldið, og tað var sum altíð væleydnað*



*Suni Schwartz Jacobsen, stjóri í Føroya Banka og Janus Petersen, forstjóri bankans og nevndarformaður í Trygd*



*Fitt av fólki hevði leitað sær niðan í Norðurlandahúsið í gjár til hátíðarløtuna hjá P/F Trygd*